**Regnhlíf 2008/09**

Norðurlendski paraplyfelagskapurin fyri barnabókarithøvundar hevur farna árið arbeitt við at fáa sína egnu heimasíðu, hendan er nú at síggja á www.regnhlif.com

Í september 2008 var fundur í Gøteborg í samband við bókamessuna har, tíverri var undirtøkan ikki eins góð og árið undan, tá ið felagskapurin varð settur á stovn. Ísland, Sápmi og Grønland høvdu ikki orku at senda nakran, og úr Danmark kom einans eitt umboð. Á fundinum vóru endamálsorðingar gjørdar, og framløgur vóru um umstøðurnar hjá høvundunum í ymsu londunum.

Á sjálvari messuni hevði Regnhlíf ein bás, har vit sýndu fram bøkur og gjørdu vart við hvussu lítið verður týtt millum norðurlendsku málini.

Í ár fara Regnhlíf umboðini at hittast í Biskops Arnø í mai, hetta fyri at umrøða hvat vit sum felagsskapur kunnu gera fyri at varðveita skeiðini fyri norðurlendskar høvundar, sum hava verið hildin har síðan 1960 og nú eru í vanda fyri at verða niðurløgd.

Føroysku umboðini í Regnhlíf eru Marjun Syderbø Kjelnæs og Dánial Hoydal.

Marjun Syderbø Kjelnæs